# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ríkt tónleikalív

Nú tingið er í summarfrí og landsstýrisfólk eisini taka sær av løttum, er tað sera avmarkað, hvussu nógv tað politiska fyllur í gerandisdegi okkara. Ferðamannaskip og seglbátar og fullir bussar við fremmandafólki, kampingvognar ol. er harafturímóti tað, sum sæst aftur kring landið og her ikki minst í høvuðsstaðnum. Tíbetur hava veðurgudarnir verið í hampuliga góðum lag, og sólskynsdagarnir kunnu teljast á meira enn eini hond.

Tað, sum vit kanska hoyra mest til í hesum døgum og fara at frætta enn meira um komandi vikurnar, eru tónleikatiltøk. Her hava verið dansistevnur og konsertir. Ikki meira enn at Summartónarnir eru tagnaðir, so verða teir avloystir av fólkatónleiki. Komandi dagarnar verður stór fólkatónleikasrastevna kring landið. Umframt at hon er fólkslig verður hon eisini á fleiri plássum úr Kirkju til Mykinesar. Tað er einki minni enn ófatiligt fyri ikki at siga fantastiskt, at okkara fámenta tjóð við einans fimtitúsund sálum, skal kunna vera so virkin og livandi, tá tað kemur til tónleik. Harvið er ikki sagt, at alt er líka gott.

Í næstu viku verður hæddarpunktið, tá G-Festivalurin fer av bakkastokki. Eitt serføroyskt tónleikatiltak, sum er komið fyri at verða. Ein festivalur, sum á mangan hátt er vorðið eitt slag av ambassadøri fyri Føroyar og føroyskan tónleik út í heim. Og stutt eftir at kvirran hevur tikið yvir á Gøtusandi, verður startskotið til enn ein afturvendandi festival, Summarfestivalin í Klaksvík, loyst av. Vit kunnu siga, at Føroyar við hesum báðum ymisku festivalum, hava fingið nakað nýtt, gott og gevandi inn í okkara tónleikamentan. Vit fara at ynskja fyrireikarunum av báðum tveimum góð eydnu og vóna, at tað verður teimum lív lagað, hóast veðrið ikki altíð er til vildar.

Ì hesum tónleikarúsi eiga vit eisini at steðga á og spyrja, hvussu er stætt við politiska viljanum, tá tað um tónleikin ræður. Her kunnu vit bara staðfesta, at Fíggjarmálaráðið gongur í smáum skóm, tá tað ræður um at virða tað slóðbrótandi og mennandi arbeiðið, ið musikskúlalærararnir leggja niður í okkara komandi ættarlið. Vónandi fer komandi valstríð at tvinga politikararnar at geva tónleikaundirvísingini størri ans og vælvild.

**Sosialurin**

## Er sunn fornuft innan ICES?

**OLAF OLSEN**



Eg havi lisið nýggju tilráðingina frá ICES um fiskiskapin undir Føroyum. Tað er áhugaverdur lesnaður. Summar niðurstøður eru skiljanligar, aðrar eru tað als ikki. Nakað havi eg ikki skil fyri. Tað sær annars út til, at tað er broyting í ávísum førum í grundarlagnum fyri summum niðurstøðum, og tað er sera áhugavert í sjálvum sær.

Eg skal við hesum bert taka eitt petti, sum tó hevur stóran týdning, serstakliga fyri upsafiskiskapin.

Tað stendur, at rátt verður til at minka veiðiorkuna eftir upsa við umleið 40 %, hóast tað stendur, at stovnurin er vaksin frá 1992 til 2003. Tí haldi eg, at tað er nóg so nógv avgjørt at skula minka veiðiorkuna so álvarsliga.

Men eg skal ikki siga meira um tað, men tað, sum undrar meg nógv meira, er, at um íblandingin av toski og hýsu í fiskiskapininum eftir upsa økist, so eigur veiðiorkan eftir upsa at minkast tilsvarandi meira.

Her er tað, eg haldi, at sunn fornuft heldur uppat. Vit, sum hava fylgt við fiskiskapinum undir Føroyum, síðani vit fingu fiskidagaskipanina og áðrenn, hava sæð, hvussu íblandingin av hýsu og toski hava svingað. Fyrst í nítiárunum minkaði toskurin, sum cubatrolararnir fingu sum hjáveiði, niður í 250 tons árliga fyri øll 8 skipini. Hetta var tað lægsta nakrantíð. Men skipini hildu fram at fiska sum vanligt, og íblandingin fór aftur at økjast, og fór upp um 2.000 tons.

Um tað nú vísir seg, at toskur og hýsa fer at økjast í upsaveiðini, helst tí tað er meira til av teimum, skal so upsafiskiskapurin minkast tilsvarnadi?? Um nú toskur og hýsa økjast við 100 %, sum væl kann henda, hvussu langt niður skal so upsaveiðan? Skal hon so minkast við 60 % ella kanska meira?? Tað vil í veruleikanum steðga upsaveiðini. Og hvørjum skal bíðast eftir, til upsaveiðan kann økjast aftur? Er tað tá toskurin aftur minkar??

Eg haldi, at her skortar sunn fornuft í stórum. Um toskur og hýsa økist aftur í fiskiskapinum eftir upsa, so er tað tí, at tað er meira til av hesum fiskasløgum, og eg dugi ikki at síggja annað, enn at tað er gleðiligt umframt at tað er gott fyri vinnuna at meira er at fáa av dýrari fiski. Her er tað júst, at okkara fiskidagaskipan kemur til sín rætt, men tað sær út til, at tað eru nakrir, sum ikki hava fatað eitt mukk av henni.

**Stýring av fiskivinnuni undir fiskidagaskipan (innsatsregulering)**

Um nakar skal taka okkara veiðiregulering í álvara, so mugu vit eisini nýta ta regulering, sum vit sjálvir hava sett í verk. Um tað ikki verður hugt eftir, hvat veiðiorkan er og hvussu hon broytist, so hevur tað onga meining at hava eina slíka skipan. At fylgja við, hvussu veiðiorkan nøguliga broytist, er munin lættari enn at vita, hvat fiskur fer aftur í havið og tað, sum annars kann manipulerast við undir eini kvotuskipan. So kann hon ikki nýtast at stýra við, og heldur ikki sum argument fyri góðari skipan yvir fyri teimum, sum møguliga vilja kritisera hana, t.d. umhvørvisfelagsskapir ella fiskakeyparar ella -nýtarar.

## Loftrúmið og Jenis

**JOHAN DAHL**
løgtingsmaður



Hví sigur Jenis av Rana ikki alla søguna um Loftrúmi – hví altid sáa iva ?

Sum limur í uttanlandsnevndini átti Jenis at hildið seg til teirri kunning, hann hevur fingid í nevnda málið, sum hann nú endurgevur í bløðunum við orðingum úr Útvarpinum.

Tað er rætt, at Loftrúmið er danskt málsøki og harvið ikki yvirtikið av okkum at umsita, - men hví bleiv tað danskt málsøkið upprunaliga ??

Jú, - tí at loysingarsamgongan, sum sat í 1963 bað danir um at umsita loftrúmið, tí føroyingar ikki høvdu førleikan tá til tað, og síðani hava danir gjørt tað umvegis samstarvsavtalu vid íslendskar loftferðslumyndugleikar.

Danskir myndugleikar hava nú boðið sær til at seta nýggja radartøkni upp á Sornfelli, uttan kostnað fyri Føroyar, og at tað er uttan kostnað, er fyrst og fremst, tí tað er danskt málsøki, og í aðru syftu hetta tí at ICAO endurrindar tann kostnaðin, sum tengdur er at etablera radarin, sum vanligt er eisini aðrastaðni.

Meirilutin í uttanlandsnevndini hevur, sum Jenis eisini veit, í skrivi til løgmann sagt, at vit vilja samstarv í hesum nevnda sambandi. Og eisini gjørt vart vid, at um møguligt er at nýta føroyingar, ið hava førleika til at taka sær av arbeiðinum, at passad radaran, at tad so eisini verdur umhugsað at nýta hesa arbeidsmegi.

Í samband vid eina eventuella yvirtøku av loftrúminum , so hevur meirilutin í uttanlandsnevndini eisini áður í vár heitt á løgmann í samband vid ráførslu, um at kanna fyrimunir og vansar og inntøkur og kostnað av at yvirtaka loftrúmið, og er hetta eisini kunnað í løgtinginum at Bjarni Djurholm sum hevur málsøkið og kannar hesi viðurskifti í løtuni.

So Jenis, - hví lýsa málið á tann hátt tú ger ??

Loftrúmsmálið og radarin er als ikki so "fordækt" sum Jenis og Miðflokkurin vil gera tað til.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13³⁰


**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.